

# Statoil aftur funnið gass og olju

Jan Müller

13.04.2014 - 21:21

Oljan >

Statoil hevur aftur funnið gass og olju á Valemon-leiðini í Norðsjónum.

Fundið er í norðara parti av Valemon-leiðini, og felagið sigur, at nøgdin er mett til einastaðni millum 20 og 75 milliónir tunnur.

Tor Madsen, sum er økismenningarleiðari hjá Statoil í vestara parti av Norðsjónum, sigur, at tey eru sera væl nøgd úrslitið, og at felagið nú fer at kanna, hvussu best er at skipa útbyggingina.

Statoil er fyristøðufelag á Valomen-leiðini, og samstarvsfeløgini eru Petoro, Centrica Resources og Norske Shell. Tey fýra feløgini fara nú at kanna, um tað er skilabest at knýta tað nýggja fundið upp í Valemon-leiðina.

Valemon-leiðin er ein tann største Statoil-leiðin á norskum øki, sum er undir útbygging.